## Eyðun Nolsøe á ovastu rók

Sangurin Hvønn dag av nýggju fløguni hjá Eyðuni Nolsøe hevur í nakrar vikur bjóðað av um ovasta plássið á 15 teimum bestu, og hesa vikuna eydnaðist tað popschlagara veteraninum úr Klaksvík at røkka ovastu rók. Lagið hjá Eyðun hevur skumpað Mín Russiski Vinur hjá Páll Finnur Páll av trúnuni, sum best umtókta lag í Føroyum í dag. Harumframt eru løg við Boys In A Band, Eivør, Lenu Andersen, Tannbustband og Rannvá Jacobsen á listanum.



## Ógvisligt óhapp í sjónvarpinum

Danska sjónvarpsrásin TV3+ vísti í gjár ógvisliga óhappið hjá Top Gear vertinum Richard Hammond. Fyrstu boðini av sjúkrahúsinum í Leeds vóru at Top Gear verturin Richard Hammond hevur fingið álvarsligan heilaskaða eftir ferðsluóhappið, tá hann í fjør í einum rasarabili við jet-motori koppaði við næstan 500 km/t. Hammond greiddi sjálvur frá um óhappið, og vísti fyrst tvær væleydnaðar koyringar í bilinum. Her koyrdi hann 505 km/t. Síðan vísti hann myndir av túrinum har eitt dekk punkteraði. Richard Hammond greiddi frá, at hann er komin seg væl eftir óhappið.



# Serbia vann Eurovison

**Tað gjørdist Serbia, ið vann Eurovision finaluna leygarkvøldið. Ein 22 ára gomul kvinna setti øll hini londini á pláss**

EUROVISION
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Myndatekstur: Marija Serifovic og hinar í serbiska bólkinum vóru ovfarakátar um sigurin*
*Mynd: polfoto*

22 ára gamla Marija Serifovic sang sangin Molitva so sannførandi, at Eurovision næsta ár verður hildið í Serbia. Ílatin mannfólkaklæði, minti Marija mest um Roy Orbison. Hon var á onkran hátt júst tað umvenda av donsku DQ og ukrainsku Verka Serduchka, ið vóru menn latnir í sum kvinnur. Hóast stigamunurin til endans var rættiliga stórur niður til Ukraina á øðrum plássi, so var rættiliga spennandi í løtum.

Annars var talan um eitt sera fjøllbroytt Eurovision tiltak, og tey, ið spáddu, at Eurovision var broytt fyri altíð, við sigrinum hjá Lordi høvdu rætt. Her var rokkur, poppur, fólkatónleikur og ymiskt.

Eins og spátt frammanundan vóru tað tey Eysturevropeisku londini, ið dominerаðu, einastu lond í top 14, sum ikki vóru úr Eysturevropa vóru Turkaland á fjórða plássi og Grikkaland á sjeynda plássi. Verður reglugerðin tann sama í komandi ár, sum í ár, koma tey fremstu 14 londini beinleiðis í finaluna, meðan hini skulu í eina hálvfinalu. Londini í Vesturevropa áttu tyngra endan av tabellini, frá 17. plássi og uppeftir. Einasta eysturevropeiska land, ið blandaði seg í hetta stríðið var Littava á 21. plássi.

Grannaatkvøður hava altíð verið galdandi í Eurovision, serliga Noðrurlond og lond í Suðurevropa hava verið hervilig til hetta. Men nú somikið nógv lond úr Eysturevropa luttaka, ið hava eina kenslu av felagsskapi, so gerst hesin trendurin so øgiliga dominerandi.

**Danir atkvøddu fyri grannum**

Serliga í Danmark hava atfinningarnar ímóti grannaatkvøðunum verið harðar. Men danir vóru ikki petti frægari sjálvir, við sum vant at geva hinum Norðurlondunum (í hesum førinum var bert eitt, nevniliga Svøríki) fult stigatal. Danska Ekstra Bladet hevur gingið á odda við sínum atfinningum, og nú leggur blaðið eftir vinnarasanginum, ið blaðið meтur vera eitt kopi av einum albanskum sangi, ið kappaðist í fjør. Videobrotið, ið blaðið brúkar sum próvførslu er tó alt annað enn sannførandi.

| *Úrslit* | *Land* | *Stig* |
|---|---|---|
| 1 | Serbia | 268 |
| 2 | Ukraina | 235 |
| 3 | Russland | 207 |
| 4 | Turkaland | 163 |
| 5 | Bulgaria | 157 |
| 6 | Hvítarussland | 145 |
| 7 | Grikkaland | 139 |
| 8 | Armenia | 138 |
| 9 | Ungarn | 128 |
| 10 | Moldova | 109 |
| 11 | Bosnia/Hersegovina | 106 |
| 12 | Georgia | 97 |
| 13 | Rumenia | 84 |
| 14 | Makedonia | 73 |
| 15 | Slovenia | 66 |
| 16 | Lettland | 54 |
| 17 | Finnland | 53 |
| 18 | Svøríki | 51 |
| 19 | Týskland | 49 |
| 20 | Spania | 43 |
| 21 | Litava | 28 |
| 22 | Frakland | 19 |
| 23 | Stóra Bretland | 19 |
| 24 | Írland | 5 |



*Eivør fer aftur í ár á pall á Spotfestivalinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Budam, Eivør og Boys In A Band á Spot

**Tað hevur leingi ljóðað, at Boys In A Band skulu spæla á Spot Festivalinum, men nú er tað almannakunngjørt á heimasíðuni hjá festivalinum. Samstundis vóru Eivør og Budam sett á skránna**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nilsuin@sosialurin.fo*

Eivør, ið var stóra høvuðsnavnið á AME-Føroyar hevði eina framúrskarandi framførslu í Norðurlandahúsinum og sannførdi tí umboðið fyri Spot-festivalin um, at hon eigur at sleppa á stóra sýnisgluggatiltakið í Århus, har hon eisini spældi í fyrra árið. Hinir báðir bólkarnir Budam og Boys In A Band høvdu somuleiðis sera sannførandi framførslur á tí minna AME-pallinum, ið var í Kagganum, hesar framførslur fullu somikið væl í smakkin hjá umboðnum fyri Spot Festivalin, at teir eisini vóru bodnir við. Hetta er fyrstu ferð, at hesi bæði nøvnini vera spottaði. Frammanundan er greitt, at Lena Andersen luttekur á Spot-festivalinum, sum partur av norðurlendskum sangskrivara verkstaði. Lena luttók eins og Eivør á Spotfestivalinum í 2005.

Spot-Festivalurin er í stóran mun ein ídnaðarfestivalur, har eini 500 fólk úr evropeiska tónleikaídnaðinum luttaka. Men samstundis eru eisini nógvir vanligir áskoðarar. Festivalurin er hildin í nógvum ymiskum hølum í jútlendska høvuðstaðnum, við nógvum ymiskum sløgum at konsertum.

Í ár verður 13. ferð at skipað verður fyri hesum festivali, ið alsamt gerst ein meira virdur sýnisgluggi fyri norðurlendskan tónleik.

Í fjør vóru Føroyar sera væl umboðaðar á festivalinum av Knút Háberg Eysturstein, Teiti, 200, Høgna Lisberg og The Dreams, umframt Valravn við føroysku songkvinnuni Onnu Katrina Egilstrø.